VINNU SÍÐURNAR

Nr. 92 • hósdagur • 19. mai 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Útlit fyri gassframleiðslu á Atlantsmótinum




**Ætlanin er at fara undir útbygging av gassfundinum Laggan miðskeiðis millum Hetland og føroyska markið. Hetta verður fyrsta gassútbygging á Atlantsmótinum og kann hon fáa stóran týdning fyri framtíðar gassfund í føroyskum øki í framtíðini.**

OLJUFRAMTÍÐ
*Jan Müller*
*Jan@sosialurin.fo*

Tað má sigast at vera góð timing av Statoil, tá felagið mikudagin bjóðar føroyingum at vitja høvuðsborgina í London og greiða frá bretska gassmarknaðinum og tilgongdini í gassframleiðslu í Europa seinastu árini. Tí júst í hesum døgum hevur eitt av heimsins størstu oljufeløgum, tað franska Total gjørt av at fara undir at fyrieika útbygging av tí fyrsta gassframleiðandi feltinum á Atlantsmótinum, miðskeiðis millum Hetland og føroyska markið. Talan er um Laggan gasskelduna, sum varð funnin fyri umleið 20 árum síðani. Fleiri brunnar hetta seinasta árið hava sannført Total og tess partnarnar, Eni, Chevron og Dong, feløg, sum eisini øll eru sera virkin á Føroyaøkinum, at tað lønar seg at fara undir at menna Laggangasskelduna. Hon liggur norðan fyri risastóra Clair oljufeltið, sum fór undir framleiðslu fyri stuttum, eftir at verða funnið í 1978. So lív er við at koma í gamlar kolventiskeldur í hesum økinum, sum so eisini liggur rættiliga tætt upp at føroyska markinum. Hvat sjálvandi eisini eru góð tíðindi fyri okkum.

Sambart oljutíðarritinum Uppstreym verður nú kannað, hvussu ein slík útbygging skal síggja út tvs. um brúk er fyri einum framleiðslupalli ella um øll framleiðslan skal fara fram á sjálvum havbotninum. Væntast kann at útbyggingin fer at taka eini fýra ár og at fyrsta gassið kemur á marknaðin í antin 2009 ella 2010.

Enn er ikki avgerð tikin um, hvussu gassið skal flytast men fleiri møguleikar verða kannaðir. Tað kann antin fara gjøgnum verandi leiðing, sum gongur frá Schiehallionfeltinum og til Sullom Voe í Hetlandi. Ein annar møguleiki er at leggja ein 250 kilometrar langan leiðing til Alwyn pallin (eisini Totalogn) norðaliga í Norðsjónum og síðani festa í Friggleiðingina, sum førir gassið til St. Fergus í Skotlandi, sum Total eisini umsitur.

Ein slík útbygging og tilgongd kann veruliga fáa týdning fyri aðrar møguligar útbyggingar. Eitt nú gassfeltini Torridon og Laxford og Victoria, øll gassfund, sum eru gjørd fyri nógvum árum síðani, men sum einsamøll metast at vera ov lítið til at byggja út. Kemur ein infrastrukturin frá Laggan fær tær kollveltandi týdning fyri øll hini fundini.

Og hyggja vit so eftir gongdini um okkara leiðir, so er okkurt, sum bendir á, at gass eisini er ein møguleiki. Og í okkara umráði verður torført at sleppa av við gass. Men hevur tú eina gassleiðing í grannalagnum, so er hetta lagamanni.

Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Oljufyrisitingini sigur, at hetta eru góð tíðindi fyri Føroyar. At gassframleiðsla kemur í gongd merkir, at vit fáa ein infrastruktur ella undirstøðukervi, sum so aftur kann fáa stóran týdning fyri aðrar møguligar gasskeldur í økinum, og her eisini í føroyskum øki. Tað kann gera, at gassfund um okkara leiðir, hóast hesi ikki nýtast at vera so stór, gerast lønandi. Sigurð í Jákupsstovu bjóðar Logganprojektinum vælkomnum og vónar, at tað fer at seta gongd á menning av øðrum gasskeldum eisini.

Ein orsøk til at gassframleiðsla á Atlantsmótinum hevur áhuga er tann, at Bretland um ikki so langa tíð fer at hava sera stóran tørv á at keypa gass. Hóast partur av eftirspurninginum fer at verða nøktaður við norskum gassi, so kann gass av Atlantsmótinum eisini fáa stóran týdning.

## Nú bara Chevron

Heimsins næststørsta oljufelag ChevronTexacoUnical fer í næstum at broyta navn til bara Chevron. Eftir samanlegging við Texaco hevur felagið verið kallað ChevronTexaco. Men nú hevur felagið so bjóðað uppá stóra oljufelagið Unocal, sum eftir øllum at døma skjótt verður partur av ChevronTexaco. Men tá tað verður mett, at tað verður og strævið at brúka heitið ChevronTexacoUnical er avgjørt bara at brúka navnið Chevron. Tað merkir so eisini, at føroyingar skulu venja seg við at brúka navnið Chevron, tá felagið verður umrøtt um okkara leiðir í framtíðini. At navnið og felagið hevur okkara áhuga kemst av, at felagið júst hevur fingið tilutað leitilovyi á okkara landgrunni. Tað situr so eisini á loyvum í bretskum øki, sum eru sera áhugaverd, eitt nú loyvi stutt frá føroyska markinum, har eitt stórt oljufund varð gjørt í fjør. So Chevron fer allarhelst at vera eitt av orðunum og nøvnunum, sum vit fara at hoyra meira til her á landi komandi árini.